

## Føroysk innrás

Umframt áhugaverda spælið uttan fyri vøllin, so er talan við føroyskum brillum eisini um áhugaverda gongd á vøllinum. Síðani seinasta summar hava Hans Jørgensen, Páll Klettskarð og Erling Jacobsen havt sáttmála við Fremad Amager, og júst nú eru eisini fleiri aðrir føroyingar í felagnum. Vit hava áður skrivað, at Vagnur Mohr Mortensen nú venur við felagnum, og hesa vikuna eru tríggir aðrir føroyingar eisini partur av venjingunum. Teir eru Jann Martin Mortensen úr NSÍ, Kristoffur Jakobsen úr KÍ og Ásbjørn V. Gunnarsson úr B36.

# Súni Olsen fer til Viborg

**Leikluturin sum eykamaður hjá AaB er ikki nóg mikið hjá Súna, sum roknar við meira spælitíð hjá Viborg**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Felagsskiftið varð kunngjørt í morgun, og verður Súni soleiðis partur av hópinum hjá Viborg, sum í vár skal stríðast fyri at yvirliva í bestu deildini.

- Súni er ein spælari, sum vit kunnu nýta á fleiri plássum, og tí styrkir hann avgjørt um breiddina um hópinum. Og hartil verður kappingin um plássini í hópinum størri, sigur Steffen Højer, sum er ítróttastjóri hjá Viborg, við bold.dk.

Tað eydnaðist okkum at fáa orðið á Súna fyri evstamark okkara. Men við heimasíðuna sigur hann, at hann gleðir seg at fáa møguleikan at spæla fast í donsku superliguni. Og at fremsta málið sjálvandi er at hjálpa felagnum í stríðnum at sleppa undan niðurflyting.

Tað er Jákup í Stórustovu, sum hevur staðið fyri samráðingunum, og hann sigur, at talan er um sáttmála, sum í fyrsta umfari er galdandi í hálvt ár. Hetta tí tað hevur stóran týdning fyri bæði Viborg og Súna, um felagið er partur av superliguni næsta kappingarár ella ikki.

# Silvur í triðju finaluni

**Í síðstu viku stóð at lesa í Sosialinum, at Bárður Bendix Mikkelsen fór at vera partur av finaluni, ið felag hansara Middlefart VK, hevði megnað at spælt seg í. Tað skuldi tó vísa seg at vera minimalt, tí Bárður hevði skaða at dragast við**

FLOGBÓLTUR

*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Bárður Bendix Mikkelsen er 30-ára gamal og hevur heili 74 landsdystir fyri Føroyar í skjáttuni, umframt at hann hevur spælt heili 352 divisiónsdystir. Hetta eru tøl, ið ikki eru til at snúgva seg rundanum. Og man tað óivað vera av somu orsøk, at Middelfart VK á Fjóni fekk sær fatur á føroyinginum, ið við sínum 188 cm er ein dyggur stuðul hjá teimum.

Bárður spælur sum hevari, men kann eins væl nýtast allastaðni á vøllinum. Slík eru evnini hjá vælspælandi føroyinginum. Bárður hevur eisini prøva at spælt flogbóltsfinalu í Noregi, tá hann spældi saman við Rúna Weihe í BK Tromsø.

Sunnudagin var finaludagur, og Middlefart VK skuldi møta Marienlyst í donsku steypafinaluni. Úrslitið gjørdist 3-0 til Marienlyst, ið tó fekk dygga mótstøðu í øllum trimum settunum. Men onkursvegna koppaðu settini yvir til Marienlyst móti endanum, og so var greitt at teir kunnu kalla seg steypavinnarar í Danmark. Bárður hevði ein skaða at dragast við í vinstra fótliði, so hansara luttøka var minimal.

Hvør veit, um ikki Middelfart høvdu staðið seg enn betur, um Bárður var 100 % klárur. Sett úrslitini í tøttu finaluni sunnudagin vóru: 25-22, 25-21, 25-21.

**Miðumfar, Bólkur I**

| Lið | D | V | J | T | Málmunur | | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. Kroatia | 2 | 2 | 0 | 0 | 93 : 78 | 15 | 6 |
| 2. Noreg | 2 | 2 | 0 | 0 | 54 : 48 | 6 | 4 |
| 3. Pólland | 2 | 1 | 0 | 1 | 87 : 91 | -4 | 2 |
| 4. Danmark | 2 | 1 | 0 | 1 | 58 : 51 | 7 | 2 |
| 5. Slovenia | 2 | 0 | 0 | 2 | 51 : 62 | -11 | 0 |
| 6. Montenegro | 2 | 0 | 0 | 2 | 46 : 59 | -13 | 0 |

**Dystir**

| | Lið | | | Úrslit | Dato |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kroatia | : | Pólland | 32:27 (14:14) | 17.01.2008 |
| 4 | Pólland | : | Slovenia | 33:27 (23:14) | 18.01.2008 |
| 6 | Kroatia | : | Slovenia | 29:24 (16:15) | 20.01.2008 |
| 7 | Danmark | : | Noreg | 26:27 (10:14) | 17.01.2008 |
| 9 | Montenegro | : | Danmark | 24:32 (9:18) | 18.01.2008 |
| 11 | Noreg | : | Montenegro | 27:22 (16:11) | 20.01.2008 |
| 25 | Kroatia | : | Montenegro | | 23.01.2008 |
| 26 | Danmark | : | Slovenia | | 24.01.2008 |
| 27 | Noreg | : | Poland | | 22.01.2008 |
| 28 | Denmark | : | Croatia | | 22.01.2008 |
| 29 | Slovenia | : | Norway | | 23.01.2008 |
| 30 | Montenegro | : | Poland | | 24.01.2008 |
| 31 | Croatia | : | Norway | | 24.01.2008 |
| 32 | Poland | : | Denmark | | 23.01.2008 |
| 33 | Slovenia | : | Montenegro | | 22.01.2008 |

**Miðumfar, Bólkur II**

| Lið | D | V | J | T | Málmunur | | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. Frakland | 2 | 2 | 0 | 0 | 58 : 45 | 13 | 4 |
| 2. Ungarn | 2 | 1 | 0 | 1 | 59 : 56 | 3 | 2 |
| 3. Spania | 2 | 1 | 0 | 1 | 58 : 57 | 1 | 2 |
| 4. Svøríki | 2 | 1 | 0 | 1 | 48 : 47 | 1 | 2 |
| 5. Týskland | 2 | 1 | 0 | 1 | 50 : 54 | -4 | 2 |
| 6. Ísland | 2 | 0 | 0 | 2 | 40 : 54 | -14 | 0 |

**Dystir**

| | Lið | | | Úrslit | Dato |
|---|---|---|---|---|---|
| 13 | Spania | : | Ungarn | 28:35 (12:14) | 17.01.2008 |
| 16 | Ungarn | : | Týskland | 24:28 (12:13) | 19.01.2008 |
| 18 | Spania | : | Týskland | 30:22 (12:12) | 20.01.2008 |
| 20 | Ísland | : | Svøríki | 19:24 (9:11) | 17.01.2008 |
| 21 | Svøríki | : | Frakland | 24:28 (13:18) | 19.01.2008 |
| 24 | Frakland | : | Ísland | 30:21 (17:8) | 20.01.2008 |
| 34 | Ungarn | : | Ísland | | 23.01.2008 |
| 35 | Svøríki | : | Týskland | | 24.01.2008 |
| 36 | Frakland | : | Spania | | 22.01.2008 |
| 37 | Svøríki | : | Ungarn | | 22.01.2008 |
| 38 | Týskland | : | Frakland | | 23.01.2008 |
| 39 | Ísland | : | Spania | | 24.01.2008 |
| 40 | Ungarn | : | Frakland | | 24.01.2008 |
| 41 | Spania | : | Svøríki | | 23.01.2008 |
| 42 | Týskland | : | Ísland | | 22.01.2008 |




*Tað var ein fegin Todi Jónsson, sum í gjár kundi seta undirskrift á sáttmálan um samanlegging við Kastrup Boldklub*

*Mynd: Amagerbladet*

# Kastrup við í Amager

**Dreymurin um eitt komandi stórlið á Amager kom eitt stórt fet nærri, tá Todi Jónsson í gjár kundi skriva undir samstarvsavtalu við Kastrup Boldklub**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við undirskriftini av sáttmálanum gerst FC Amager nevnliga veruleiki sum samanlegging. Í fleiri ár hevur verið tosað um eina samanlegging av feløgunum, og umframt Kastrup hava eisini Kløvermarken og Amager FF verið í ítøkiligum samráðingum um samanlegging.

- Hvussu verður við teimum báðum feløgunum – og møguliga øðrum við – fái eg ikki sagt í løtuni. Tað er ein spurningur, sum í fyrsta lagi nevndirnar og í øðrum lagi aðalfundurin hjá feløgunum skulu taka støðu til. Men nú er so greitt, at FC Amager er veruleiki. Og sjálvandi er vónin, at samanleggingin í framtíðini gerst enn breiðari og størri, sigur Todi Jónsson, sum er bæði nevndarformaður og virkandi stjóri í Fremad Amager.

Fremad Amager og Kastrup Boldklub eru tey bæði størstu feløgini í Amager, og tí er einki at ivast í, at júst Kastrup hevur vigað sera nógv í tosinum um samanlegging.

Um týdningin av, at júst Kastrup er fyrsta felagið, vil Todi ikki siga tað stóra. Men hann slær fast, at fyri vónirnar um eitt komandi stórfelag, er hetta eitt sera stórt fet.

- Sjálvandi er enn langur vegur eftir. Men hetta er startskotið til eitt nýtt felagslið, og í so máta var talan um eitt sera stórt fet fyri okkara viðkomandi, sigur hann.

Skrásetingar til nýggj feløg skulu vera DBU í hendi innan 1. mars, og soleiðis fer FC Amager at verða nýtt sum heiti hjá felagnum, tá sjøtul verður settur á nýtt kappingarár seinast í juli. Vónandi við nýggju samanleggingini í næst bestu donsku deildini.